# MIF TOP RUN

**35 rennarar tóku lut, tá tey í Mjørkadali skipaðu fyri rennikapping niðan á Sornfelli**

RENNING
*tíðindaskriv*

Leygardagin 6. septembur kl. 15.00 varð runnið MIF TOP RUN frá Statoilstøðini í Kollfjarðadali og niðan á Sornfelli. Teinurin var 9,8 km. langur og tað var Mjørkadals Ítróttafelag, sum skipaði fyri.

35 rennarar teknaðu seg til at renna henda teinin, sum var ein stór avbjóðing. Tað var mótbrekka, so at siga, allan vegin, men tann størsta avbjóðingin var uttan iva teir seinastu fýra kilometrarnar niðan á Sornfelli.

Í bólkinum hjá monnum vann Sigurð Justinussen úr Bragdinum, nummar tvey gjørdist Jonhard Larsen úr Treysti og Jónálvur Johannesen úr Kollafirði gjørdist nummar trý.

Hjá veteranunum (teir eru føddir í 1957 ella fyrr) vann Steindor Hjaltalin úr Bragdinum kappingina hjá monnum. Næstir honum komu Henning Clemens Poulsen úr MÍF og Robert Vilhelmsen úr Bragdinum.

Í bólkinum hjá kvinnum vann Tordis Debes Eiriksfoss úr Bragdinum, nummar tvey gjørdist Tina T. Johannesen úr Hoyvík og Ingrid B. Patursson úr Bragdinum gjørdist nummar trý.

Jóngerð Høgnesen úr Bragdinum vann kappingina hjá veteran kvinnum.



*Nógv varð lagt fyri, tá tey 35 luttakandi runnu leygardagin*

# Enn eitt fimleikaár byrjað

TÍÐINDASKRIV
*Ljósið*

Leygardagin 6. sept. var árliga innmeldanin hjá Fimleikafelagnum Ljósinum. Við hálvtfimthundrað limum longu skrásettir frá ársbyrjan umframt teir, sum eru gamlir í garði, mugu vit bara sanna at fimleikur er sera vælumtóktur. Størsti íðkaraskarin telist millum lítlu børnini, sum við fimleiki fáa gott í beini til allan annan ítrótt og almenna innlæring. Kappingarlið felagsins fara í gongd um lítlan mánaða og hava vit bjartar vónir til teirra. Felagið hevur FM-heitið bæði á amboðs- og rútmusíðuni at verja frá undanfarna ári.

### Dyrgja eftir vaksum fólki

Sum eina roynd at ávirka almenna hugburðin, ið tykist vera, at fimleikur er bara fyri børn og yndisligar ungar kvinnur, hevur felagið lýst eyka við avspenning/-yoga, ballstik og dream-team fyri at fáa vaksið fólk, bæði kvinnur og menn, at íðka. Hetta hevur givið bonus, og eru vit spent eftir at vita, hvussu leikur fer. Hetta er eisini ein sannkenning um tosið um fiti sum vaksandi trupulleika í vesturheiminum, at vit bjóða hesi skeið fram. Ætlandi skulu tey eggja til trivnað og gleði við fimleiki og kropsligum rørslum sum natúrligum parti av gerandisdegnum. Stutt sagt: Tað skal vera ein lívsstílur at vera í rørslu.

# Nú byrjar fimleikurin hjá Støkk aftur!

TÍÐINDASKRIV
*Støkk*

Mánadagin 15. septembur fara fyrstu liðini hjá Støkk undir venjingarnar aftur. Komandi fimleikavetur hevur Støkk nógv at bjóða bæði royndum og óroyndum íðkarum.

Størsti parturin av fimleikarunum hjá Støkk eru børn. Hesi koma til venjing hvørja viku at spæla, læra og hugna sær saman. Gentuliðini gera nógvan rútmiskan fimleik, meðan dreingjaliðini fáast meira við reiðskapsfimleik. Eins og undanfarin ár, hevur Støkk lið fyri børn í øllum aldri, har øll eru hjartaliga vælkomin at luttaka.

Nú kunnu vit endiliga bjóða fólki at koma til aerobic venjingar aftur í Støkk! Eftirspurningurin hevur verið stórur seinastu árini, og nú er tilboðið um aerobic fimleik aftur á skránni. Væntandi fara nógv at taka við hesum tilboði. Vant verður hvørt mánakvøld í fimleikahøllini í Søldarfjarðar Skúla, og er tað Annika Joensen, sum fer at taka sær av undirvísingini.

Um aerobic ljóðar ov strævið, er eisini møguleiki at íðka motiónsfimleik. Jóhanna Troest venur liðið, sum verður kallað motiónskvinnur. Motiónskvinnurnar venja hvørt týskvøld í Glyvra Skúla.

Síðsta fimleikavetur byrjaði eitt nýtt lið fyri vaksin. Tað eru Ludvík Justinussen og Johannes Steingrund, sum eru venjarar í reiðskapi og styrki. Liðið er bæði fyri menn og kvinnur; venjingin verður lagað til fimleikararnar, soleiðis at øll fáa nakað burturúr. Vant verður hvørt hóskvøld í høllini á Rituvíkshálsi.

At íðka fimleik økir um vælveruna, og styrkir hjartað og blóðrensl. Fimleikafelagið Støkk er fyri øll, bæði ung og gomul. Kom og verð við!

## ÚRSLIT

**MENN**

| NR. | NAVN | TÍÐ | FELAG | ÁRG. |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Justinussen, Sigurð B. | 00:46:15 | Bragdið | 1967 |
| 2 | Larsen, Jonhard | 00:48:11 | Treysti | 1966 |
| 3 | Johannesen, Jónálvur | 00:49:00 | Kollafjørður | 1974 |
| 4 | Olsen, Jósvein Herup | 00:52:27 | Bragdið | 1958 |
| 5 | Olsen, Rúni Herup | 00:53:02 | Bragdið | 1972 |
| 6 | Joensen, Jóan Karl | 00:54:35 | Bragdið | 1987 |
| 7 | Petersen, Dorian | 00:55:21 | Bragdið | 1968 |
| 8 | Petersen, Flemming | 00:56:19 | Roysnið | 1960 |
| 9 | Hjort, Peter Moll | 00:56:49 | Signabøur | 1982 |
| 10 | Jacobsen, Reidar | 00:57:15 | NÍF | 1974 |
| 11 | Simonsen, Kári | 00:57:29 | Triatlon Tórshavn | 1959 |
| 12 | Kruse, Oddmar | 00:57:51 | MIF | 1962 |
| 13 | Olsen, Johannes | 00:58:05 | Tórshavn | 1981 |
| 14 | Berg, Jákup-Alberg | 00:58:53 | Bragdið | 1963 |
| 15 | Dam, Toni | 00:59:51 | MIF | 1967 |
| 16 | Feldballe, Michael | 00:59:58 | Gjógv | 1973 |
| 17 | Clarlund, Jan | 01:00:19 | MIF | 1969 |
| 18 | Skoubo, Ib H. | 01:01:29 | MIF | 1961 |
| 19 | Gjedde, Carsten | 01:03:22 | MIF | 1970 |
| 20 | Andersen, Ulrik | 01:03:51 | MIF | 1965 |
| 21 | Gram, Peter | 01:06:27 | MIF | 1959 |
| 22 | Christensen, Allan | 01:09:45 | MIF | 1964 |
| 23 | Poulsen, Mads Helgi | 01:28:24 | Tórshavn | 1977 |

**MENN, VETERANAR**

| NR. | NAVN | TÍÐ | FELAG | ÁRG |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Hjaltalin, Steindor | 00:56:28 | Bragdið | 1949 |
| 2 | Poulsen, Henning | 00:56:34 | MIF | 1951 |
| 3 | Vilhelmsen, Robert | 00:58:25 | Bragdið | 1951 |
| 4 | Rasmussen, Evald | 00:59:31 | Bragdið | 1956 |
| 5 | Olsen, Ólavur Herup | 00:59:38 | Bragdið | 1943 |
| 6 | Hansen, Hans Birgir | 01:07:14 | Bragdið | 1949 |
| 7 | Jóanesarson, Regin | 01:15:31 | Vestmanna | 1945 |

**KVINNUR**

| NR. | NAVN | TÍÐ | FELAG | ÁRG |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Eiriksfoss, Tordis Debes | 01:03:50 | Bragdið | 1965 |
| 2 | Johannesen, Tina T. | 01:06:06 | Hoyvik | 1974 |
| 3 | Patursson, Ingrid B. | 01:12:24 | Bragdið | 1958 |
| 4 | Jakobsen, Anna Rúna | 01:18:33 | Bragdið | 1958 |

**KVINNUR, VETERANAR**

| NR. | NAVN | TÍÐ | FELAG | ÁRG |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Høgnesen, Jóngerð | 01:06:35 | Bragdið | 1948 |



**Heimarøktin og Serforsorgin**
*Meginskrivstovan*

## Leiðari til Stuðulsfólkaskipanina fyri vaksin

Eitt starv sum leiðari fyri Stuðulsfólkaskipanina fyri vaksin undir Heimarøktini og Serforsorgini, verður hervið lýst leyst til setan sum skjótast ella eftir nærri avtalu.

Leiðarin hevur ábyrgd mótvegis stjóranum.

Stuðulsfólkaøkið fyri vaksin fevnir um stuðul til 55 heimabúgvandi brúkarar, svarandi til 40 fulltíðarstørv.

Talan er um starvsøki, sum tann setti skal byggja upp saman við leiðsluni í Heimarøktini og Serforsorgini. Leiðarin hevur dagligu fyrisitingarligu-, fíggjarligu- og fakligu heildarleiðsluna av Stuðulsfólkaskipanini og skal saman við leiðsluni í Heimarøktini og Serforsorgini hava ábyrgdina av:

- at røkta ta fyrisitingarligu leiðsluna
- at uppbyggja og samskipa stuðulsvirksemið
- at veita starvsfólkunum fakliga ráðgeving
- at reka mennandi starvsfólkapolitikk
- at seta í starv og siga starvsfólkum úr starvi eftir nærri ásettum reglum
- at tryggja gott samstarv innanhýsis og við aðrar stovnar og skipanir
- at tryggja støðuga fakliga menning
- at menna samstarvið millum ymiskar fakbólkar, myndugleikar og áhugabólkar
- at hava eftirlit við at játtaða fíggjarætlanin verður hildin
- at fyrireika fíggjarlógararbeiðið fyri virksemið hjá skipanini

**Krøv:**
Tað verður væntað av umsøkjaranum, at hann hevur viðkomandi fakliga útbúgving og royndir, hevur hug og hegni at arbeiða sjálvstøðugt og dugir at seta í verk fyriskipanir. Fyrimunur er um umsøkjarin hevur leiðslu- og fyrisitingarligar royndir av líknandi arbeiði.

**Setanar- og lønarviðurskifti:**
Løn- og setanartreytir eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Heimarøktina og Serforsorgina. Tænastustaðurin í løtuni er Stuðulsfólkaskipanin.

Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at hetta kann verða umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur innan stovnin.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja til Heimarøktina og Serforsorgina á tlf. 304020 og tosa við Mary J. í Garði, stjóra ella við Regin Johansen, virkandi leiðara fyri Stuðulsfólkaskipanina.

**Umsóknir:**
Skrivlig umsókn, við avriti av prógvum, viðmælum v.m. skulu sendast til:

**Heimarøktin og Serforsorgin**
Att.: Mary J. í Garði, stjóri
Eirargarði 2, Postboks 3037
FO-110 Tórshavn

**Umsóknarfreist:** 30. september 2003 kl. 12.00.

**Vestmanna Arbeiðarafelag**

## Aðalfundur

Lýst verður til eykaaðalfund 20. sept. kl. 14.30.

- Uppskot frá nevndini um at hækka limagjaldið.

**Nevndin**

Sosialurin
1
Fyrst við tí seinasta

**Bingo!**

Vit hava landsins størsta og bíligasta úrval til eydnuspøl:

Bingoblokkar
Gekkapennar
Eykaspøl
Pausubingo
Bingomaskinur
Skavispøl: m.a. 'Skava og vinn'
Jólakalendarar



**Vit hava altíð eina loysn so tín felagsskapur fær størri inntøkur**

Ring og fá brosjuru okkara senda!

**Jørgensen Engros Føroyar**
**Tel 210386/ 213161**
kari@jørgensen-engros.dk · www.foreningsnyt.dk

team85

HOTEL VÁGAR *** THE AIRPORT HOTEL

*Allan september-mánaða!*

**VÁGA PIZZA**



*Frítt val úr okkara pizzamenu*

**2 fyri 100,-**

*Bíleggið á tel 33 29 55 - vit koyra eisini út!*

HOTEL VÁGAR
FLOGFELAG FØROYA
SØRVÁGUR
TEL 33 29 55 · FAX 33 23 10 · T-Postur: hotel@ff.fo

**SUZUKI LIANA 1,6**
**169.500,-**

Ein rúmligur familjubilur við nógvari útgerð, so sum:

*Aircondition*
*Alufelgur*
*Hiti í setrunum framman...*




**Spf. Eyðbjørn Hansen**
*FO-100 Tórshavn • Tel. 313375 og 213375*